# Nólsoyar skúli

## Lærarar skúlaárið 2008/09

Í Nólsoyar skúla verða komandi skúlaár 24 næmingar frá 1. til 7. flokk.

- Vit leggja dent á, at umsøkjarar eru fúsir at taka við tí avbjóðing, tað er, at upp til 4 ymiskir árgangir eru í sama bólki, at undirvísingin er fjølbroytt og næmingalagað, og at einstaki næmingurin er í miðdeplinum.
- Vit leggja dent á, at lærarar okkara hava hugflog og fleksibilitet og eru fakliga væl fyri, so skúlin er í støðugari menning.
- Vit leggja dent á gott samstarv og trivnað millum foreldur, næmingar og lærarar.
- Vit leggja dent á, at arbeitt verður eftir endamálsorðingini hjá Nólsoyar skúla

**Søkt verður eftir:**

- Einum lærara í fast starv at byrja 1. august 2008
- Einum lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/09 vegna tímar til ráðgeving og avlopstímar.

Starvið verður lønt sambart avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Fasta starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumaður frammanundan.

Bæði størvini umfata fult vikutímatal.

**Lærugreinaøki :**

- Alt lærugreinaøki í 1. – 3. flokki
- Føroyskt, danskt, kristni, søgu, enskt og alisfrøði í 4.-7. flokki
- Handaverk og List
- Sangur og tónleikur
- Serundirvísing

Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi tann 23. juni k. 12.00.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Gunnvør Joensen, skúlaleiðara tlf. 282465



## Fish & Chips Vaglið

**til sølu um nóg høgt boð fæst.**

**Áhugaði kunnu ringja**

**tlf. +45 20 82 78 49**

Vágs Kommuna

# Barnaansingin hjá Vágs kommunu søkir eftir fólki

Til barnagarðin Eikilund verður søkt eftir:

1 avloysara at starvast 30 tímar um vikuna, fyri hjálparfólk í farloyvi, frá miðskeiðis í august 2008 til miðskeiðis í juli 2009.

1 reingerðingsfólki/hjálparfólki at byrja miðskeiðis í august 2008.

Til frítíðarskúlan verður søkt eftir:

1 avloysara at stavast 30 tímar um vikuna, fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi, frá miðskeiðis august 2008.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfeløg.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry Joensen tlf. 373024.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 30. juni 2008 kl. 12.00

Umsóknin skal sendast til:

**Vágs kommunu**
Vágsvegur 22
FO-900 Vágur

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn

## Havrannsóknarskip

Í samband við projektering av nýggjum havrannsóknarskipi verða áhugaðar skipsteknistovur við hesum biðnar

um at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna fyri at fáa neyðuga tilfarið.

Hetta skal verða innan tann 20. juni 2008 kl. 15:00. Vart verður gjørt við at útlendskar skipsteknistovur, ið hava vent sær til Fiskirannsóknarstovuna um sama mál, fáa sama møguleika.

SEA-STAR

## Lastbilførari

Søkt verður eftir førara við stórum koyrikorti til lastbil okkara at byrja skjótast gjørligt. Bilurin hevur 17,5T krana, og er tað tí ein fyrimunur, um tú hevur kranaloyvið.

Umsøkjarin má eisini verða tilreiðar, at átaka sær aðrar uppgávur í felagnum, tá tað gerst neyðugt.

## Verkfrøðingur/ Byggifrøðingur/Byggiteknikari

Vegna økt virksemi verður hervið søkt eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella byggiteknikara. Tú kemur í høvðusheitum at hava byggileiðslu og tilrættislegging av byggiarbeiðum um hendi. Eisini verður tín uppgáva:

- Tilboðsútrokning
- Uppfylging
- Innkeyp
- Eftirlit
- o.a. sum hoyrir starvinum til

**Førleikakrøv**

Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur, byggiteknikari ella líknandi ástøðiliga útbúgving og hevur kt-kunnleika á brúkarastøði. Fyrimunur er eisini at hava royndir við byggileiðslu.

Vit arbeiða mest í Føroyum og Grønlandi, so umsøkjarin kann eisini roknað við nakað av ferðing í starvinum.

Løn og treytir verða smb. avtalu.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til Jákup Martin á tlf. 59 00 59, ella til skrivstovuna á tlf. 44 99 77

**Umsóknarfreistin er 23.06.2008**

Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SEA-STAR Contractors Spf.**
Heiðavegur 72
Postboks 220
610 Saltangará

**SEA-STAR Contractors Spf.** er stovnað í 2003. Í høvuðsheitum fáast vit við betongarbeiðir, byggiarbeiðir av vinnubygningum og havnabygging. Eisini reka vit persónbilaverkstað. Í løtuni byggja vit høll á Toftum, har ætlanin er at framleiða betongelementir. Uml. 40 fólk starvast hjá fyritøkuni. Dóttirfelagið SEA-STAR Diving Spf. er eitt kavarafelag, har uml. 5 mans starvast.

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

